DAGSINS MEINING

Á vandakós

Valið í Ísrael gjørdist ikki óvæntað ein sigur fyri Likud og Sharon. Hetta merkir sjálvsagt, at Sharon heldur fram sum stjórnarleiðari. Sum kunnugt hevur Sharon hildið eina sera harðrenda kós mótvegis palestinensiska fólkinum. Politikkur Sharons í Miðeystri hevur elvt til miklan ófrið og vaksandi terrorismu, og hesin politikkur er ein forðing fyri varandi friði í økinum. Hetta stendst m.a. av, at Sharon bert sær eina hernaðarliga loysn á einum trupulleika, sum er politiskur. Hann hevur tí rent seg í somu trupulleikar sum aðrir, ið hava gjørt sama mistak. Hetta merkir, at terrorin og ófriðurin bert økjast, meðan teir partar av palestinensiska fólkinum, ið ynskja eina politiska loysn, vikna.

Altjóða eygleiðarar, ið hava gjørt viðmerkingar til valúrslitið, eru samdir um, at hetta merkir, at Ísrael fer at reka ein upp aftur meira høgravendan politikk enn higartil. Hetta fer at hava sum fylgju, at landið gerst uppaftur meira isolerað, soleiðis, at hetta plágaða land at enda bert hevur ein vin í heiminum – USA. Úrslitið er, at útlitini fyri varandi friði bert versna. Hetta er mikið spell, tí ófriðurin í Miðeystri kann skjótt breiða seg. Serstakliga óheppið er hetta, um Bretland og USA loypa á Iraq, tí hetta fer at draga Ísrael inn í kríggið. Harðrendi politikkur Sharons er stuttskygdur. Hóast heisn politikkur kann geva Ísrael sigur í fyrra umfari, fer hesin politikkur sum frá líður at koma Ísreal í størsta vanda.

Arbeiðaraflokkurin tapti. Veljararar hansara sótu við hús og lótu høgravonginum valið. Hetta er ein vanlukka fyri Ísrael, og nú er spurningurin, um flokkurin letur seg tøla upp í stjórnina hjá Sharon. Hetta er áður hent, nevniliga eftir síðsta val, og hetta kostaði flokkinum dýrt. Hinvegin er Arbeiðaraflokkurin einasti flokkur, ið veruliga vil frið, og Peres er ein av teimum fáu, sum Arafat kann gera avtalur við, og tað kundi tala fyri stjórnarsamstarvi. Arbeiðaraflokkurin hevur eisini ein moralskan trupulleika, og tað er, at mangt bendir á, at Sharon, ið hevur politisku og løgfrøðiligu ábyrgdina av hópdrápunum í Sabra og Shatila, møguliga verður ákærdur fyir krígsbrotsverk við ein dómstól í Belgia. Onnur sakarmál í øðrum londum fara at fylgja eftir og at enda fer eisini altjóða dómstólurin í Haag at kanna ákærurnar móti Sharon. Tá vil Arbeiðaraflokkurin standa við moralskari og politiskari medábrygd av øllum tí, sum Sharon hevur havst at gjøgnum eitt langt lív.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tvey sjónarmið sum eg illa kann einast við

Gerhard Lognberg
løgtingsmaður og borgarstjóri í Skopun

Hoyrdi eitt kvøldið ein sjónvarpsmann gera eina samrøðu umborð á einum stórum línubáti. Eg fekk ta uppfatan av samrøðuni, at tað vóru teir smáu útróðrarbátarnir, sum vóru tann størsta móttanin ímóti grunnunum. Her eri eg ikki samdur, tí hesin partur av flotanum verður so nógv forðaður av veðri og streymi og øðrum avmarkingum, sum aðrir ikki hava so eg endurtaki tað, sum eg ofta áður havi sagt, útróðrarflotin undur 10 tons eigur at fiska frítt, so hetta ikki hendur oftari at smábátar liggja tí teir hava fiskibann, meðan allur hin flotin fiskar sum um einki var hent.

Eitt annað sjónarmið hoyrdi eg í Útvarpi Føroya. Har segði stjórin á Hagstovuni, Hermann Oskarsson at hann helt ikki, at tað var nakað forgjørt at vit sendu fisk óviðgjørdan av landinum. Hesin maður veit væl saktans, hvat hann tosar um, men álíkavæl eri eg ikki samdur við honum.

Ein annar skilamaður, Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, stuðlaði honum væl og helt, at vit kundu ikki ella nýttust ikki at hava so nógvan kapacitet, at vit kláraðu topparnar. Hesin maður veit eisini væl, hvat hann tosar um.

Í mínari verð skuldi tað verði málið at arbeitt allan fisk, sum kemur upp á land, men sjálvsagt kunnu undantøk verða. Í veruleikanum hava vit tað flottasta virki í landinum, sum stendur stilt nevniliga virki í Vági og sum skilst kemur hetta virkið at liggja stilt í 7 mánaðir. Hvat skuldi verið meiri natúrligt enn tað, at fiskurin bleiv arbeiddur á hesum virki hesa tíðina, so kundu arbeiðsfólkini arbeitt á virkinum sum onki var hent, heldur enn at verða uppsøgd.

Til síðst, nei lati okkum arbeiða so nógv her á landi av tí ríkidømi, sum verður fórt til lands.

Og hitt er: latið okkum politikarar taka okkum saman og lata bátar undir 10 tons fiska frítt.

Viðmerkingar til formannin í Føroya Lærarafelag

Jacob Vestergaard
formaður

Formaðurin í Føroya Lærarafelag hevur í seinastuni fleiri ferir gjørt vart við sína hugsan um Mentamálaráðið og um kommunurnar, og teirra manglandi førleika, tá tað snýr seg um skúlaviðurskiftir.

Formaðurin í Føroya Lærarafelag hevur sett seg á Mentamálaráðið og Fólkaskúlan, og har má onki hugsast uttan hansara loyvi. Formaðurin í Føroya Lærarafelag skal fylgja við og avgerða hvørjir tankar skulu hugsast í Mentamálaráðnum.

Tað má sigast at vera ein ótrúliga fornaldarligur hugburður, sum formaðurin í Føroya Lærarafelag hevur, tá hann sigur, at umsitingin í Mentamálaráðnum ikki má arbeiða við øðrum enn tí sum landstýrismaðurin biður um, og landstýrismaðurin skal sjálvandi ikki biðja um annað enn tað sum formaðurin í Føroya Lærarafelag vil hava.

Eftir áskoðanini hjá formanninum í Føroya Lærarafelag eru kommunurnar sum heild óegnaðar at hava skúlan undir hond, tí at kommunurnar í Føroya Kommunufelag ikki glaðbeintar góvu seg undir ein sáttmála, um at taka lut í lønunum hjá lærarunum.

Føroya Kommunufelag tók støðu í viðurskiftunum sum tey eru, tað vil siga, at Mentamálaráðið er arbeiðsgevari og tí er tað teir sum gera sáttmálar við lærararnar um øll teirra tænastuviðurskifti, eisini røkt av serstovum. Tað at Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag gera ein sáttmála sum er so óframfesionellur, at hann tekur kommunurnar inn í viðurskiftini er óvikomandi fyri kommunurnar, men tað sigur nógv um hvussu óbúgvið Føroya Lærarafelag er sum samráðingarpartur.

Formaðurin átti at takka Føroya Kommunufelag fyri hjálpina, nú savnsrøktin verður tikin við í arbeiðstíðina hjá lærarunum.

Viðareiðis kommuna er tikin fram sum eitt ræðandi dømi um hvussu illa kommunurnar fara við skúlanum. Viðareiðis kommuna hevur spent seg út á skúlaøkinum og hevur bygt ein skúla, sum ikki stendur aftan fyri nakran. Tað at kommunan heldur seg til grundregluna um, at tað er Mentamálaráðið, sum er arbeiðsgevari hjá lærarunum, og tí aftraði seg við at gjalda fyri savnsrøktina, er avgjørt at taka hattin av fyri.

Í gomlum døgum æt Fólkaskúlin Kommunuskúlin og kommunurnar høvdu ábyrgd av honum.

Í álitinum um uppgávu- og ábyrgdarbýrið millum land og kommunur er Fólkaskúlin nevndur sum eitt øki við ógreiðum ábyrgdarbýti. Tá soleiðis er, kann talan vera um, at leggja hann annaðhvørt til kommunurnar ella til landið. Tí er hetta eitt evnið, sum skal viðgerðast og ikki setast á tabulistan hjá formanninum í Føroya Lærarafelag.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Heldur byggja brýr enn blaka bumbur

TÍÐINDASKRIV

Marjun Bæk, prestur, Jóanes Nielsen, rithøvundi og Rói Patursson, háskúlastjóri eru millum røðararnar á Vaglinum leygardagin

Leygardagin 1. febr. kl. 14.30 verður Fólkafundur fyri friði á Vaglinum í Havn. Fyrireikararnir eru Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sosialistiskt Ungmannafelag og Unga Tjóðveldið. Í tíðindaskeivi heita teir á allar føroyingar um at taka lut á fólkafundi fyri friði. Har er ætlanin á friðarligan og virðiligan hátt at mótmæla ætlanunum um hernaðarligt álop á Irak, sum kann gera ein ræðandi krígsvanda til blóðugan veruleika. Fyrireikararnir siga í tíðindaskrivi:

- Vit vísa ikki minsta samhug við harðrenda einaræðisstýrið hjá Saddam Hussein
- Men vit halda, at frælsi og fólkaræði í Irak bert kann vinnast við friðarligum, politiskum amboðum - ikki við vápnum
- Eitt álop kann bert íbirta eitt kríggj, har avleiðingarnar verða tær ræðuligastu fyri tey, sum frammanundan eru harðast rakt: Fólkið í Irak
- Eitt kríggj móti Irak kann fáa óbøtiligar avleiðingar fyri ta viðbreknu støðuna í øllum Miðeystri, og økir um vandan fyri yvirgangsatsóknum í øllum heiminum
- Tí mótmæla vit, at tikið verður til vápnaðan bardaga og kríggj móti Irak
- Ístaðin styðja vit allar royndir at fáa heimsins friðarelskandi tjóðir at ganga saman í ST og aðrastaðni um at nýta síni nógvu og sterku politisku amboð at finna friðarligar loysnir
- Vit styðja øll tiltøk, sum á ein friðarligan hátt kunnu byggja brýr millum tjóðir og vinna framá í stríðnum móti kúgandi einaræði og yvirgangi
- Tí mótmæla vit eisini øllum ætlanum, sum á nakran hátt kunnu draga føroyingar og Føroyar upp í fyrireikingar til hernaðarligt álop á Irak og kríggj

Røðarar:
Marjun Bæk, prestur
Jóanes Nielsen, rithøvundur
Manijeh Elsa Modi, lesandi
Rói Patursson, háskúlastjóri

Tónleikabólkur spælir undir fundinum og skipar felagssangin

Stovna ST-felag í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 6. februar kl. 19:30 verður stovnandi aðalfundur av føroyskum áhugafelag fyri ST. Fundrin verður hildin í hølunum hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond 22.

Á skránni er stutt umrøða av hugsjónini aftan fyri ST; stutt kunning um ætlanina við føroyska ST felagnum, síðani stovnan av tí føroyska ST felagnum, innliming, val av skrivara, kassameistara og formanni; og ymiskt annað.

ST felagið verður í fyrstu aløgu ein sjálvstøðugur felagsskapur, ið miðvíst fer at arbeiða fyri øktari vitan um ST í Føroyum, bæði um hugsjónina aftan fyri ST og teim mongu verkætlanunum hjá ST á ymiskum økjum. Sum frá líður er ætlanin at royna at fáa felagsskapin við í altjóða kervið av ST-stuðulsfeløgum, tað sokallaða UNA sambandið.

Tilmelding/upplýsingar:
teldupost:
a-j@post.olivant.fo ella
tlf.: 225139 (Justin Philbrow). Sí annars
www.unafo.webpuffin.com

Øll eru vælkomin á fundin 6. februar.

Sosialurin i Sosialurin

Minningarorð um

Karl Højsted

f. 22 sept. 1913 – d. 19. aug. 2002

Minnini liva eftir hjá teimum, ið hava mist

Tað kom ikki so óvart á, nú lívstráður tín slitnaði.

Vit undraðust mangan , at tú hóraði undan, tí heilsuveikur vart tú frá ungum av, hevði ring lungu og mátti liva tað mesta av tíni tíð við heilivági.

Hóast hetta, gavst tú ikki á hondum, tú vart lívsglaður og takksamur fyri lívið, vart gávuríkur og royndi at hanga í líka til ellisár.

Tær dámdi væl at smíða, fríðka uttan um húsini, at fáast við plantur og hevði stóran áhuga fyri tí, sum var rundan um teg - fylgdi sera gjølla við í tí, sum fór fram í samfelagi okkara og hevði eina greiða støðu, bæði á tí politiska og átrúnaðarliga økinum. Áhugin fyri sangi var sera stórur, og rødd tín smæddist ikki burtur. Eisini fekst tú við at skriva andaligar sangir.

Tú dugdi væl at siga frá, og abbabørnini, sum tú vart so góður við, munnu hava havt manga góða løtuna, tá ið abbi segði teimum søgur.

Deknatænastuna í Funnings kirkju røkti tú í 40 ár - tá vóru eyguni farin at bila, so tað bar ikki so væl til longur.

At koma til Guðs orð lá ógvuliga frammarlaga hjá tær, og á møtum hevði tú altíð ein góðan vitnisburð at leggja fram, onkuntíð ein sang, sum tú sjálvur hevði yrkt.

Hesin síðsti sangurin, ið tú skrivaði, ber boð um lívstímaglasið, ið brátt er runnið niður.

Sólsetur

Lag: So skal tað nú álvara vera.

Her lívið nú ber móti enda,
og kreftirnar fjara so smátt,
í bøn eg vil til tín mær venda
lat skilnaðin ei vera brátt.

Gev stundir og tíð til at takka,
fyri alt sum eg hernirði fekk
eg síggi, at sólin fer lækka,
tað gongur ei nú, sum tað gekk.

Tú førdi meg trygt gjøgnum lívið
og skaða ei ilt kundi meg,
hjá tær eg nú alla tíð blívi
væl vardur á sannleikans veg.

Ja, tíðin er brátt niður runnin,
eg hetta nú viðkennast vil,
av Jesusi eri eg vunnin,
hans lív og hans deyð kravdi til.

Ei, gull ella silvur meg loysti,
men hansara dýrbara blóð
við hesum eg tykkum nú troysti,
kom gangið í hansara slóð.

Ja, Jesus er vinurin besti,
ein fylgjast kann við her á jørð,
tí havi eg vón og gott treysti,
tá flytast skal yvir um fjørð.

Hóast heilsuveikur so stóran part av lívinum, náddi tú ein høgan aldur, og tað, sum helt tær uppi, var tín grundfasta trúgv, og bønirnar til tann almáttuga Guð.

Av lyndi vart tú lítillátin og tókst einki sum eina sjálvfylgju, men legði alt í Guðs hond, eisini nú, tá ið sjúkan av álvara, og so nívandi gjørdi um seg.

Í sanginum sigur tú:"Eg síggi , at sólin fer lækka, tað gongur ei nú, sum tað gekk." Nú gekk tað ikki meir.

Teir síðstu dagarnir av lívi tínum vóru veðurgóðir við nógvari sól, og tú, sum altíð var so glaður, tá sólin, við sínum lívgevandi strálum, sá inn gjøgnum vindeygað, vildi hava gardinurnar fyri, tí nú orkaði tú hana ikki meir, men ynskti og bað bert um at sleppa Heim.

19. august, í fagrasta sólskini, sovnaði tú stillisliga og varð fluttur yvir um fjørð til ta ævigu sólina, sum biðar okkum øllum.

Friður hvíli yvir minni tínum

Konan og børnini